Fornminnisfólk hittust í Vágum

Fólk frá flestu fornminnisfeløgunum í landinum hittust til árligan fund í Miðvági sunnudagin

FORNMINNI
Edvard Joensen

Fólk frá fornminnisfeløgum og Føroya Fornminnissavni hyggja at helluni í Hýsisá, har Mikkjal á Ryggi høgdi síni ørindi í 1909

Mynd: Edvard Joensen

Miðvági: Sunnudagin hittust umboð fyri flestu fornminnisfeløgini og í landinum saman við fólki frá Føroya Fornminnissavni á stevnu í Miðvági.

Fólk við áhuga fyri fornminnum hava seinastu árini árliga hitst hjá hvørjum øðrum at røða um felags áhugamál. Eisini hava fólk frá Føroya Fronminnissavni verið við á hesum fundum. Tann sjeyndi av hesum árligu fundunum var sunnudagin í Miðvági. Tá hittust fólk frá teimum flestu av teimum 14 -15 fornminnisfeløgunum, sum eru í landinum. Fornminnisfelagið í Miðvági var vegna tey trý feløgini í oynni vertur fyri fundinum

Hildur Joensen er skrivari í Miðvágs Fornminnisfelag. Hon greiðir frá, at dagurin byrjaði við fyrilestrum í bygdarskúlanum í Miðvági. Fyrst helt hon sjálv ein fyrilestur um Jansagerði, har hon greiddi frá bygningum og søgu hjá gamla prestagarðinum.

Miðvágs Fornminnisfelag hevur fingið gomlu uppsitarhúsini í Jansagerði sum felagshús. Tað vil siga, eini hús, sum vórðu bygd fyrrapartin í farnu øld av tilfari, sum fingið var frá gomlu uppsitarhúsunum á prestagarðinum.

Miðvágs Kommuna hevur keypt húsini og latið Fornminnisfelagnum tey í varðveitslu. Felagið ger tey í stand og fer at brúka tey til felagsarbeiði, sigur Hildur Joensen. Talan verður kortini ikki um nakað savn sum so, sigur Hildur Joensen, men eini felagshús, har ymisk tiltøk kunnu haldast.

Eftir fyrilesturin um Jansagerði, varð eisini hildin fyriliestur, har greitt varð frá bygdarsavninum í Sørvági.

Seinnapartin vóru aftur fyrilestrar ella kunning, sum onkur valdi at nevna tað, í bygdarskúlanum í Miðvági, har millum onnur landsantikvarurin, Steffen Stumman Hansen, greiddi frá virkinum hjá Fornminnissavninum og hvat Savnið í framtíðini hevur av ætlanum.

Sum vera man varð eisini vitjað ymsastaðni í oynni, har nógv søgulig støð eru at hyggja at.

Um middagstíð varð farið til Sørvágs at síggja bygdarsavnið har, áðrenn farið varð til døgurða á Hotel Vágum. Dagurin endaði við rundvísing í Miðvági og Sandavági.

Í Miðvági varð hugt at Beitishúsunum, har Mikkjal á Ryggi var føddur. Húsini, og sum Vága Dansifelag nú eigur og hevur undir umvæling. Úr Beitinum varð farið niðaní Hýsisá at síggja tey bæði ørindini, sum Mikkjal á Ryggi í hoyna 1909 høgdi í helluna. haðani varð farið niðan í Kálvalíð at síggja gomlu húsini har.

Úr Kálvalíð varð farið yvir um í Jansagerði, og endaði dagurin í Vágum við eini rundvísing við Løgmansgarðin á Steig í Sandavági

The Beatles í Vágum

Fyri fyrstu ferð nakrantíð fer at bera til at uppliva The Beatles live í Føroyum. Sjálvandi við føroyskum tónleikarum og frásøgufólki. FS Vágar skipar fyri stórum Beatles tiltaki á Giljanesi

TÓNLEIKATILTAK
Edvard Joensen



Størsta Beatles tiltakið í Føroyum nakrantíð verður á Giljanesi leygarkvøldið 17. mei

Vágar: Leygarkvøldið tann 17. mei skipar stuðulsfelagið hjá FS Vágum fyri stórum Beatles tiltaki á Giljanesi. Tríggir tónleikabólkar fara at spæla Beatlesløg frá byrjan til enda av livitíð Beatlanna.

Odmar Ravnsfjall, sum er ein av fyrireikarunum, sigur, at hetta er vist fyrstu ferð, at slíkt tiltak verður hildið í Føroyum. Hetta er stórt tiltak, sum hann eisini væntar sær nógv av. Tríggir úrvaldir tónleikabólkar fara at framføra Betalesløg í kronologiskari raðfylgju, eftir hvussu løgini eru gjørd. Bólkarnir hava fingið hesa bundnu uppgávuna og hava vant til tiltkakið í einar tveir mánar, sigur hann.

Tiltakið er býtt sundur soleiðis, at hvør bólkurin tekur sær av sínum tíðarskeiði í Beatles søguni. Fyrst er tað ein bólkur, sum nevnir seg Ják' upsa Skegg, sum mannaður er við monnum sum Sámali Ravnsfjall, Ronnie Nielsen, Ólavi Øster, Torbergi Johannesen og Jóan Peturi Andreasen, sum fer at umboða »ungu Beatlarnar«, sum teir siga. Tað eru løg, sum gjørd er í tíðarskeiðnum fram til 1965.

Eftir teir fer All That Rain við Jens Tummasi Næs, Henningi Nicodemussen, Hansi Ravnsfjall og Poul Arna Holm at framføra løg frá árunum 1965 til 1967. Løg frá »Rubber Soul« til »Sgt. Pepper«, greiðir Odmar Ravnsfjall frá.

Seinasti bólkurin er »Showmenn«, mannaður við Jens Marna Hansen, James Olsen, Johannusi á Rógvu og Finni Hansen. Teir fara at taka um endan. Árini frá 1967 til 1970.

Tó verður ikki bara live tónleikur hetta kvøldið. Dyrnar lata upp klokkan 23.00, og tá fer Robert McBirnie at venda plátum, Beatles løg sjálvandi, fram til klokkan hálvgum tólv. Hetta verða sonevnd »cover løg«, sum aðrir hava spælt inn. Robert McBirnie verður frásøgumaður gjøgnum alt tiltakið hetta kvøldið.

Síðan sleppa teir einstøku Beatlarnir til við løgum, teir hvør sær hava gjørt eftir Beatlestíðina.

Fyrstur verður Ringo Starr, hvørs løg verða at hoyra frá klokkan 23.30 til 23.45, tá Geroge Harrison tekur yvir til midnátt.

Tá fara »teir ungu Beatlarnir«, teir fram til 1965, á pallin og spæla í ein tíma, greiðir Odmar Ravnsfjall frá. Síðan fær Paul McCartney orðið í eitt korter, áðrenn »miðlinga Beatlarnir« sleppa fram at í ein tíma.

Tá er so bara John Lennon eftir, sum fær tað seinasta korterið, áðrenn teir nýggjastu Beatlarnir koma á pallin. Tiltakið endar klokkan halvgum fýra við felagssangi, sum verður »All you need is love«, sigur Odmar Ravnsfjall.

Atgongumerki til tiltakið verða seld í forsølu frá mikumorginum. Tey fara at fáast í Kunningarstovuni í Havn, í Kiosk Vár í Runavík, á Shellstøðini í Gøtudali og í Mylluni í Miðvági.

Atgongumerkini fara í forsølu at kosta 170,- krónur, men 200,- krónur við dyrnar, um nøkur vera eftir, tá latið verður upp. Tað verða bara 1.200 atgongumerki seld, tí fleiri fólk sleppa ikki inn í høllina á Giljanesi, siga fyrireikararnir.

Varandi loysnir fyri teimum brekaðu

Ann Mari Joensen helt røðu, tá norðoyingar savnaðust um Merkið flaggdagin

Ann Mari Joensen helt flaggdagsrøðuna í Klaksvík, og hon kom inn á hetta, at tað í ár er ár teirra brekaðu. Hon kom millum annað inn á, at tað ofta verður lopið upp um, har garðurin er lægstur ístaðin fyri at finna varðandi loysnir

FLAGGDAGSHALD
Solby A. Eliasen

Klaksvík:
Heilt fitt av fólki varð savnað í Vágstúni til flaggdagshald, hóast tað var heldur kaldligt í veðrinum. Klaksvíkar Hornorkestur og skótar gingu skrúðgongu frá Klaksvíksgarðinum og heim í Vágstún, har Ann Mari Joensen flutti fram røðu.

Ann Mari Joensen helt fyri, at tað má vera eitt tekin uppá áhuga og ábyrgdarkenslu fyri øllum bólkum í samfelagnum, at fyriskipararnir av bæði Flaggdagshaldinum og Grækarismessuhaldinum í ár hava valt at lata heitið á árinum, Ár teirra brekaðu, seta dám á røðurnar báðar.

Ann Mari tosaði um viðurskiftini hjá teimum brekaðu her á klettunum. Hon setti fram spurningar, um tey munnu fáa eina kenslu av at hoyra til onkunstaðni og at hoyra saman.

Hon segði, at okkurt er hent á økinum. Umlættingarheim, bústovnar og sambýlir eru komin, og samstundis sum hon vísti takksemi fyri tað, segði hon tó, at hetta langt frá nøktar tørvin, sum er.

Men hon helt, at tað at tey eru farin at flyta brekað inn aftur á Eirargarð er at leypa upp um garðin, har hann er lægstur. Her eftirlýsti hon varðandi loysnum. Ánn Mari samanlíknaði eisini litirnar í okkara flaggi við tey brekaðu.

– Tann reyði liturin er tekin um blóð og stríð. Vit hava minst Kristus nú á páskum, hvussu hann stríddist fyri okkum. Tey, ið bera brek, hava trúnna upp á nakað gott. Tey eru einkul sum barnið og lata onki órógva teirra trúgv.

Somuleiðis bar hon hinar báðar litirnar í flaggi okkara saman við teimum, ið bera brek. Blátt fyri vónina og hvítt fyri reinleikan og kærleikan. Og so vísti hon á, hvussu týdningarmikið tað er at hava vón, trúgv og kærleika við gjøgnum lívið. Ann Mari eigur sjálv eina dóttur, sum er monogol. Hon segði, at tað er ótrúliga læruríkt at blíva foreldur at einum, ið ber brek.

– Ein fær onnur lívsvirði. Barnið togar teg niður á eitt einfalt støðið og vísir okkum á, hvussu gott, gevandi og friðfult tað einkulta í veruleikanum er. Vit taka so nógv fyri givið, sum vit heldur áttu at grundað yvir og verið takksom fyri, segði Ann Mari Joensen.

Hon helt fram, at hon sum mamma hevði sæð, at tað ikki er nakar trupulleiki hjá teimum, ið bera brek at verða góðtikin av tí yngra ættarliðinum. Men heldur er tað tað, at samfelagið ikki er búgvið til uppgávuna.

– Verður ikki ov nógv hugsað í oyrum og krónum, hvat og hvussu nógv vit fáa afturfyri, tá ið gjaldast skal, spurdi Ann Mari eisini.

Hon heitti á øll um at standa saman og geva pláss hvør fyri øðrum og saman verða ein sterk tjóð við Merkinum á odda.

Ein rød av herverkum í Havn

Sera nógv herverk hava verið framd í høvuðsstaðnum um vikuskiftið. Rútar eru knústir bæði á bilum og húsum. Løgreglan stendur á berum

LØGREGLUTÍÐINDI
Solby A. Eliasen

Ein ørgrynna av rútum eru brotnir ymsastaðni runt í Havnini sunnunáttina og morgunin. Løgreglan hevur fingið einar 10 -15 fráboðanir um brotnar rútar á antin húsi ella bili.

Vakthavandi sigur, at tað letur til, at tað eru fólk sum antin eru komin úr Norðurlandahúsinum ella høllini á Nabb, sum hava gingið eina ávísa leið og brotið rútar á vegnum.

Fyrsta fráboðanin var frá Eysturskúlanum, har onkur hevði tveitt ein av hesum stóru urtapottunum, sum standa til prýðis uttanfyri inn gjøgnum ein rút. Og so gongur eitt mynstur har frá til tey næstu støðini, har herverk eru framd antin á hús ella bilar. Og talan hevur verið um grót ella urtapott gjøgnum rútar hvørja ferð.

Í tveimum húsum á Jústsgøtu varð rútur knústur. Í tí eina kundi tað verðið heilt galið, tí ein tungur urtapottur varð tveittur inn gjøgnum rútin og lendi á einum høvdalagi, har ein ung genta vanliga svevur. Men tíbetur svav hon ikki har beint tá tað hendi.

– Um gentan lá har, so hevði verðið heilt galið, so ikki kann annað sigast enn, at hetta hevur verið sera stutt umhugsað, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

Løgreglan veit ikki at siga, hvør tað er, sum hevur framt hesi herverk. Vakthavandi sigur, at her er talan um hendingar, sum henda um næturnar.

– Tann ella tey, sum fremja herverkini, gera eisini so skjótt av, at fólk hava lítlan ella ongan møguleika fyri at síggja persónarnar, áðrenn tey sleppa sær burtur, sigur vakthavandi.

– Tann reyði tráðurin er annars tað, at nýggir bilar kunnu ikki fáa frið. Og tað er ein vánaligur mentalitetur millum nakrar ávísar bólkar av ungum, sum vísa ein avbera ógfantaligan atburð, sigur vakthavandi og vísir samstundis á, at tá summi duga enntá illa at seta eina tóma fløsku frá sær. Av eini ella aðrari orsøk knúsa tey hana heldur í vegin, har hon kann verða til skaða fyri onnur.

Rúsdrekkakoyring

Annars eru fleiri bilførarar tiknir um vikuskiftið fyri rúsdrekkakoyring. Løgreglan hevur somuleiðis tikið fólk upp av vegnum, sum ikki megna at koma til hús og antin koyrt tey heim ella ástøðina at sova rúsin av sær.

Fríggjadagin tók løgreglan ein bilførara sum koyrdi ávirkaður. Ein annar maður sat í bilinum, og hann var sera óhøviskur við annan politistin, sum var ein kvinna. Hesin verður nú ákærdur fyri brot á lógina um at fornerma ein persón í almennari tænastu.

Eitt rok var í høllini á Nabb leygarkvøldið, har tveir vóru farnir til hendurs. Løgreglan kom á staðið og tók báðar við á støðina.

Seinnapartin sunnudagin um hálvgum fimm tíðina fekk løgreglan fráboðan um eldsbruna. Eldur var komin í eini hús á Frúutrøð. Húsfólkið hevði gloymt eina grýtu. Sløkkiliðið kom á staðið og alt spældi tíbetur væl av. Húsini hava fingið nakað av roykskaða.